


*Felags fyri teir allar er, at teir arbeiða fyri Miðlahúsið og hava givið út bøkur, fv.: Árni Joensen, Vilmund Jacobsen, Birgir W. Høgnesen, Magnus Gunnarsson og Snorri Brend*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Birgir W. Høgnesen

Ein annar starvsfelagi í Miðlahúsinum, sum ikki er blaðmaður, men marknaðarmaður, er Birgir W. Høgnesen, sum er føddur og uppvaksin í Klaksvík, men giftur og búsitandi í Vestmanna.

Hann hevur eisini givið út bók. Hetta er bókin "Teir tóku kjansin", sum kom út í 2005.

Bókin er um fyrsta hekkutrolara føroyinga, Kap Farvel, sum vestmenningar keyptu úr Týsklandi hin 5. mai í 1966.

Í bókini eru samrøður við meklaran, sum stóð fyri keypinum, og har eru eisini fleiri samrøður við menn, sum vóru við skipinum.

Aftast í bókini er frágreiðing um, hvar Kap Farvel endaði sínar dagar, og har eru eisini flestu manningarlistar og avreiðingar, sum skipið hevði undir føroyskum flaggi.

Vit skulu einki avdúka her, men vit hava skilt, at hetta neyvan verður seinasta bókin hjá Birgiri W. Høgnesen, sum arbeiðir við onkrari skipasøgu aftrat.

Áðrenn hann fór at selja internet fyri Tele Tech og seinni kom í Miðlahúsið, var Birgir sølumaður hjá Føroya Lívstrygging í 12 ár.

Hann hevur eisini fingist við annað søluarbeiði og hevur soleiðis eisini selt bilar. Tilsamans hevur Birgir W. Høgnesen arbeitt sum sølumaður ymsastaðni í samfull 21 ár út í eitt.

## Magnus Gunnarsson

Magnus Gunnarsson skrivaði í 2002 bókina "Auto - altíð til tænastu". Bókin varð skrivað í sambandi við, at bilstøðin Auto í Havn hevði fimmti ár á baki í 2002.

"Auto - altíð til tænastu" er í fyrsta lagi um bilstøðina Auto, sum var stovnað í 1952. Bókin byrjar við søgubrotum um fyrstu bilarnar í Føroyum og um bilkoyring í Havn og út frá høvuðsstaðnum.

Í bókini verður eisini skrivað um aðrar bilstøðir í býnum, eins og myndir eru av bilum, bilførarum og støðgentum á bilstøðini Auto.

Nógv verður eisini gjørt burtur úr rutukoyring eftir Oyggjarvegnum og um bilførarar, sum koyrdu hesar rutur.

Magnus Gunnarsson er útbúgvin bilmekanikari og arbeiddi í fleiri ár sum slíkur. Í ár 2000 byrjaði hann at skriva um bilar í Sosialinum, her hann kom í fast starv í 2003.

Hann tekur sær eisini av "Nøvnum í vikuni", umframt at hann hevur fastan tátt á Rás2, sum nú kallast Vinnu & Bilradio.

Áðrenn Magnus Gunnarsson kom í fast starv á Sosialinum, arbeiddi hann hjá Posta í eini seks ár.

## Vilmund Jacobsen

Hann telist eisini millum "rotturnar" í føroysku blaðverðini gjøgnum mong ár. Áhugamálini eru serliga fiskivinna, arbeiði á landi og lívssøgur.

Leiðin innan blaðmannayrkið byrjaði á 14. September, og í nøkur ár var hann blaðstjóri á floksblaðnum.

Í meiri enn 10 ár stóð hann fyri útgávuni av FF-blaðnum hjá Føroya Fiskimannafelag, og síðan í mars 2002 hevur hann verið í føstum starvi á Sosialinum.

Í endanum av 2008 gav Vilmund Jacobsen út bókina "Umborð – søgur um siglandi", sum í fyrsta lagi byggir á samrøður við umleið 50 sjófólk, sum hann hevur havt í Sosialinum gjøgnum nøkur ár. Onkur samrøða er tó við, sum ikki hevur verið á prenti áður.

Hvør persónur er ein søga í sær sjálvum, men tað er ikki altíð, at fólk sjálvi halda, at júst teirra lív hevur verið nakað serstakt.

Í bókini "Umborð – søgur um siglandi" verður dentur lagdur á sjólívið, men onnur viðurskifti eru eisini tikin við, sum í stuttum lýsa lívið hjá hesum fólkum.

Ein av søgunum í bókini er um Hans Magnus Hansen, sum á vári í 2004 mundi doyð á Norðhavinum, tá bátur hansara fekk ein sjógv og sakk upp á onga tíð.

Tað var eitt Guðs undur, at ein maður umborð á einum øðrum báti, sum var á veg til lands hesa løtu, sá Hans Magnus, sum tá stóð uppi á forrútinum á sokna báti sínum – við ongari vón um bjarging.

"Umborð – søgur um siglandi" er út við 300 blaðsíður.

## Óli, Óli og Eyðun

Óli Jacobsen, sum eisini er knýttur at Miðlahúsinum, skrivaði í fjør bók um Elsu Jacobsen, trúboðara. Bókin, sum kallast "Mítt Etiopia", er um lív hennara í Etiopia sum trúboðari og sjúkrasystir, og tað var Kirkuliga Missiónsfelagið, sum stóð fyri útgávuni.

Síðst í oktober í ár kom Óli við nýggjari bók, hesaferð um havnarmannin, Daniel Jacob Danielsen, vanliga róptur Dollin.

Dollin var trúboðari í Kongo 1901-03, ið tá varð stýrt sum eitt blóðugt einaræði av belgiska kong-inum Lepold II. Byrjanin til endan á valdinum hjá Leopold varð ein kanningarferð eftir Kongoánni hjá bretska konslinum Roger Casement, har Dollin var skipari.

Komin heim til Bretlands á heysti 1903 fór Dollin undir eina fundarrøð um støðuna í Kongo. Henda fundarrøð var byrjanin til eina fólkarørslu, sum var beinleiðis orsøkin til, at Leopold mátti lata Kongo frá sær í 1908 til belgiska statin.

At føroyingur hevði lyklaleiklut í hesum verður prógvað við skjølum úr bretskum søvnum.

Men Óli Jacobsen er ikki liðugur enn og kemur við einari bók aftrat fyrst í desember í ár.

Hetta er ein bók um Petur Alberg, ið gjørdi lagið til tjóðsangin.

Hin 15. desember í ár eru liðin 125 ár, síðan hann var føddur, og tað er í hesum sambandi, at Óli kemur við hesi bókini, har søgan um tjóðsangin eisini er við.

Sum skilst, er ætlanin at halda 125 ára dagin í Müllers Pakkhúsi.

At enda í hesi umrøðu av rithøvundum, knýttir at Miðlahúsinum, kunnu vit nevna Óla Petersen og hansara mongu tekningar í Sosialinum, sum eisini eru útgivnar í bók.

Ein ungur maður, sum ikki skal verða gloymdur í hesum umfari, er Eyðun Klakkstein, dugnaligur journalistur, sum fyri nøkrum árum síðan gav út bøkur um tónleik.

Til allar seinast skulu vit nevna, at ábyrgdarblaðstjórin, Jan Müller, sum í løtuni er í farloyvi, eisini er í holt við at savna tilfar, hann gjøgnum árini hevur skrivað um olju, og tað hevur hingið í luftini, at hann ætlar sær at geva hetta tilfar í bók ella bókum.

vilmund@sosialurin.fo

Føroyaprent plantar trø